# Útlendingar trívast í Vági

**VODAFONEDEILDIN** Obi Ikechukwu Charles átti høvuðsleiklutin, tá FC Suðuroy vann uppiborið á toftamonnum í gjár. Nigerianski framherjin er ein av fleiri útlendingum, sum hava skarað framúr í suðuroyarfelagnum

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| FC Suðuroy | 3 |
| B68 | 1 |

Tað er fyri nógvum árum síðan staðfest, at suðuroyarfeløgini noyðast at hava útlendingar í hópinum, um liðini skulu hava nakran møguleika at standa seg í bestu deildini. Føroyskir fótbóltsleikararnir, sum skifta til suðuroyarfeløgini, og sum ikki hava tilknýtið til feløgini, kunnu nærmast teljast á einari hond.

Í royndini at varðveita sætið í deildini, hevur leiðslan í FC Suðuroy gjørt av at hava fýra útlendingar í hópinum. Stanislav Kuzma, málverji úr Slovenia, Mamuka Toronjadze, miðvallari úr Georgia, Mustafa Adamu, verjuleikari úr Ghana, og Obi Ikechukwu Charles, framherji úr Nigeria, royna í hesum døgum at staðfesta sítt navn í føroyskum fótbólti. Serliga Kuzma og Charles hava staðið seg væl. Og tað er sannlíkt, at teir leggjast afturat rúgvuni av útlendingum, sum hava skarað framúr í suðuroyarfeløgunum.

Tomislav Sivic, Krzyzstof Popczynski, Milan Kulic, Marcin Dawid, Evrard Blé og Dmitrije Jankovic eru millum leikararnar, sum upprunaliga spældu við FC Suðuroy – fyrr VB og VB/Sumba.

Í Vági og Sumba duga tey at finna røttu útlendingarnar.

## Obi høvuðsleiklutin

Obi Ikechukwu Charles átti høvuðsleiklutin í gjár, tá FC Suðuroy vann á B68. Framherjin stóð fyri tveimum av málunum hjá uppflytarunum, sum vunnu 3-1.

26 ára gamli nigerianin hevur í fyrstu fýra dystunum prógvað, at hann kann gerast ein fongur hjá FC Suðuroy. Kviki framherjin kann í løtum tykjast eitt sindur ófantaligur, meðan hann er á bóltinum. Men hann er beinleiðis í sínum spæli, soleiðis at hann gagnnýtir skjótleikan.

Hann økti í leiðsluna miðskeiðis í seinna hálvleiki. Charles var einsamallur við málverjanum, fór framvið honum og sendi í netið. Móti endanum staðfesti hann sigurin, tá hann var leysur av mótstøðuleikarunum inn í brotsteiginum.

Tað eru eisini greiðar ábendingar um, at Stanislav Kuzma verður ein teirra, sum suðuroyingar fara at minnast í fleiri ár. Tað staðfesti Bjarni Johansen, formaður, tíðliga í vetur.

- Nú hann hevur vant við felagnum í tvær vikur kunnu vit bara staðfesta, at hetta er ein framúr góður málverji, segði Bjarni Johansen við Suðuroyarportalin hin 12. februar.

Stanislav Kuzma hevur spælt í bestu deildini í Slovenia í fleiri ár. Í fjør royndi hann seg í kypriotiskum fótbólti.



uni@sosialurin.fo

**GLÓÐHEITUR**

*Jón Krosslá Poulsen er glóheitur, og nærkast alsamt metinum hjá suðuroyingunum.*

*Mynd: Savnsmynd*

## Krosslá nærkast metinum

Jón Krosslá Poulsen var tryggur, tá hann legði FC Suðuroy á odda móti B68 í gjár. Hann skuldi bara stýra bóltinum í tóma málið, tá Obi Ikechukwu Charles spældi bóltin upp á tvørs. Tað var hansara mál nummar 52 fyri barndómsfelagið. 22 ára gamli framherjin nærkast tí alsamt metinum sum toppskjútti hjá FC Suðuroy – ella VB og VB/Sumba, sum felagið eisini hevur rópt seg. Hann er fýra mál frá metinum, sum Jan Allan Muller eigur.

Jón Krosslá Poulsen er hin einasti av teimum seks bestu málskjúttunum, sum framvegis spæla á hægsta stigi.

**Hagtøl yvir bestu málskjúttarnar hjá FC Suðuroy** (VB/Sumba) **nakrantíð:**

Jan Allan Muller, 56
Egill Steintórsson, 55
Birgir Jørgensen, 53
Jón Pauli Olsen, 52
Jón Krosslá Poulsen, 52
Pól Thorsteinsson, 50